# Eingin biografur á páskum




Fyri tey sum ætla sær at fara ein túr í biograf á páskum, ber hetta ikki til. Havnar Bio hevur bara opið skírisdag og stongt er til 2annað páskakvøld.

– Orsøkin til, at vit hava stongt, er tí soleiðis er lógin, og lógina halda vit sjálvandi, sigur Loui úr Havnar Bio.

– Sjálvt um at vit hava stongt, merkir tað ikki, at okkara trúgvu hyggjarar fara at síggja nýggja stórfilmin Exorcisten seinri enn danir, sigur Loui. Nei, vit hava avgjørt at flyta frúmsýningina fram til mikudagin 11. apríl. So vit vísa filmin tveir dagar fyrr enn danir, sigur Loui.

## Gott ár hjá Havnar Bio

Árið í ár hevur verið eitt sera gott ár hjá Havnar Bio. Eini 5-8% fleiri fólk hava verið í Biograf í ár í mun til seinasta ár, og hetta eru vit sera væl nøgdir við, sigur Loui.

Grundin til,vøksturin er, at í ár hava gingið nógvir sera góðir filmar t.d. What a Woman, Hanibal og Cast a Way. Og sum tað sær út nú, so liggja teir har yviri í Hollyvood ikki á løtu síðu. Nógvir stórfilmar eru á veg m.a ein filmur við Rowan Atkinson og John Cleese. Spennandi verður at síggja, hvat hesir báðir kunnu finna uppá. Eitt er so heilt sikkurt. Tað er, at teir duga at fáa fólk at flenna, og man tað ikki eisini fara at eydnast hesaferð.

Hetta eru filmanir, sum fara at verða vístir í Havnar Bio í summar:

18. mai Mummy Returns v/ Brenda Fraser
25. mai Someone like you v/ Asley Judd og Ellen Barkin
1.juni Sig det er løgn v/ Chris Klein
10.mai Along came a spider v/ Morgen Freman
15.juni Exit Wounds v/Steven Segal
29.juni Peral Harbour v/ Ben Afflech
10. juli Jurassic Park 3 v/ Sam Neill
17. juli Rat Race v/ Rovan Atkinson og John Cleese
20. juli Lara Croft.tomb Raiderh



Kallkyn
Vágsbotnur · Tel. 31 62 06

# Páskaregg fyri helvtar prís

**Kiosk Sentrum er ein av størru kioskunum í Miðbýnum. Har merkja tey greitt, at fólk í dag hava meira pening, enn fyri eini 5 árum síðani. Av forvitni spurdu vit í Sentrum um søluna av páskareggum og avdúkaðu harvið ætlanir um útsølu-ætlanir, so onkutíð gerst forvitin fegin**

MIÐBÝURIN
*Dagfinn Olsen*

Kiosk Sentrum er gomul, um enn hon í dag ikki er júst hin sama, sum at byrja við. Fyrr lá hon við Tinghúsvegin. Í dag heldur kioskin til í Handilskjarnanum. Eigarin av Kiosk Sentrum eitur Olga Petersen.

Fyri at forvitnast, settu vit fram spurningar viðvíkjandi søluni av páskareggum nú, í mun til fyri fáum árum síðani, tá verri tíðir herjaðu landið.

Í Kiosk Sentrum eru tey ikki í iva. Nógv meira er at gera í dag sum heild, enn fyri eini 4 til 5 árum síðani. Keypiorkan er munandi størri í dag. Eisini er summarsølan byrjað fyrr í ár, um sammett verður við árini frammanundan.

Í Kiosk Sentrum eru tey vitandi um, at ein kiosk er eitt stað, har fólk í stóran mun leggja pening eftir seg, um tey hava nóg mikið av teimum. Ikki er alt neyðugar vørur, ið standa á hillunum, hóast ein kiosk mangan er hent. Nógv leita í kioskirnar, um teimum tørvar okkurt søtt undir tonnina, ella kanska tey eru í uppisetri fyri tubakk, ella annað, ið ein kann stytta sær stundir við.

## Forvitin fegin

Viðvíkjandi søluni av páskareggum, so tykist, sum verður eitt sindur meira selt av teimum í ár, enn árini frammanundan.

– Eitt sindur meira verður keypt, sigur eigarin av Kiosk Sentrum og avdúkar síðani óvæntað ætlaða útsølu.

Tí, hóast einki er áfatt viðvíkjandi søluni av páskareggum, so er goymslan so mikið stór, at neyðugt helst verður at selja tey fyri bíligan penga, kanska helvtar prís.

– Goymslan er stór, helst ov stór, so neyðugt verður at selja páskareggini bíliga, kanska fyri helvtar prís, verður sagt úr Kiosk Sentrum.

Soleiðis avdúkaði Sosialurin av berum forvitni útsøluætlanir, ið eingin visti nakað um. So onkutíð hendir tað seg, at forvitin gerst fegin!



**Vit hava opið soleiðis um páskirnar:**

| | |
|---|---|
| Fríggjadag 6. apríl: | Til kl. 20.00 |
| Mikudag 11. apríl: | Til kl. 20.00 |
| Skírishósdag: | Stongt |
| Langa fríggjadag: | Stongt |
| Leygardag 14. apríl: | Opið sum vanligt |
| Mánadag 16. apríl: | Stongt |
| Týsdag 17. apríl: | Opið aftur sum vanligt |

**Handlarnir í Miðbýnum**



Gleðiligar páskir !

DAMU- & HARRADEILDIN
HANDILSKJARNIN
N. Finsensgøta 8 - Tlf. 317919 www.handilskjarnin.fo